# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 14.09.2020 kl. 17.30

Á fundi:
Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Sten Spange Larsen)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Innkomið skriv viðvíkjandi Kjógvavatni.**
   Skriv frá borgarum, har heitt verður á kommununa um at gera sítt til, at Kjógvavatn ikki vallast og hvørvur.
   **Tekniska nevnd 10.09.2020:**
   Samtykt varð, at nevndin skal seta seg í samband við Umhvørvisstovuna, Friðingarnevndina, Landsverk, Rókhaga og Prestfjall, innara part.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt, at Tekniska nevnd arbeiðir víðari við málinum við at fáa neyðug loyvi til vega og ein prís fyri at gera arbeiðið.

2. **Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 456a og 456b, Sandvík.**
   Søkt verður um, at matr. nr. 456a letur umleið 338 m2 til matr. nr. 456b.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

3. **Skriv frá Hvalbiar skúlastýri viðvíkjandi lesikróki.**
   Søkt verður um pening til at gera ein lesikrók í Hvalbiar skúla. Mettur kostnaður er umleið kr. 10.000,00.
   **Trivnaðarnevndin 13.09.2020:**
   Nevndin mælir til at játta kr. 10.000,00 til lesikrók/ar.
   **Fíggjarnevndin 14.09.2020:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at játta kr. 10.000,- til endamálið.

4. **Innkomið tilboð uppá felags stigabil til sløkkiliðini í Suðuroy.**
   Sløkkiliðsleiðararnir í Suðuroynni hava arbeitt við ætlan um at keypa brúkta stigabilin hjá Tórshavnar Sløkkiliði.
   Tilboð frá Bilrøkt uppá keyp av bilinum í 2020 er kr. 297.500,00. Harumframt er kostnaður fyri 20 ára eftirlit í 2021 kr. 350.000,00.
   Hvalbiar Kommuna – keyp av bili í 2020: kr. 42.979,00
   Hvalbiar Kommuna – eftirlit í 2021: kr. 50.564,00
   **Tekniska nevnd 10.09.2020:**
   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum, um hinar kommunurnar í Suðuroynni eru við.
   **Fíggjarnevndin 14.09.2020:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum, treytað av, at Tilbúgvingarnevndin viðmælir hesum og at allar kommunurnar í Suðuroynni taka undir við hesum.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. **Umsókn um loyvi at byggja aftrat neysti matr. nr. 261, Hvalba.**
   Søkt verður um byggiloyvi til neyst, har ætlanin er at taka eitt gamalt neyst burtur og byggja nýtt ístaðin. Longdin á gamla neystinum er 10 m, meðan ætlanin er, at tað nýggja skal vera 14 m. Av tí, at neystið er framvið landsvegi, er umsóknin send Landsverk til ummælis. Sambært svari frá teimum tann 30. juni 2020, verður umsóknin ikki gingin á møti. Grundgevingin fyri hesari avgerð er, at ætlaða byggingin er innanfyri 15 m. byggilinjuna og kemur ov nær landsvegnum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt ikki at játta umsóknini um byggiloyvi, sambært tilmæli hjá byggimálsviðggeranum og grundgeving hjá Landsverk.

6. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Rúni Thomsen Poul Laust Christiansen